# Hvar koma pengarnir frá?




*Manchester City hevur ótømandi peninganøgdir at spæla við*

**FÓTBÓLTUR** Í januar mánaði brúktu Premier League feløgini næstan tvær milliardir krónur upp á leikarar. Í eini tíð, har Ongland ikki er væl fyri fíggjarliga, so tykist hetta púra ørt. So hvar koma pengarnir frá?

Tróndur Arge – Liverpool

Flytingarvindeygað lat aftur klokkan 23 tann 31. januar. Dagin eftir settu fleiri av bløðunum í Onglandi spurnartekin við ørskapin, sum endaði við, at Chelsea og Liverpool keyptu leikarar fyri yvir eina milliard tilsamans.




STJØRNURNAR HITTUST

*Fernando Torres og Steve Gerrard hava gingið undan hjá Liverpool seinastu kappingarárinum. Í gjár spældi teir móti hvørjum øðrum*

### Chelsea og russiskar milliónir

Eigarin av Chelsea er ríkmaðurin Roman Abramovich, sum sambært fleiri miðlum er millum 50 tey ríkastu fólkini í heiminum. Hann brúkar sína oljupengar at fíggja virksemið í Chelsea. Tá hann keypti felagið í 2003 gjørdu hann eina ætlan, ið skuldi tryggja, at Chelsea skuldi kunna fíggja sítt virksemið við egnum pengum í 2010. Tað hevur ikki eydnast og hvørt ár hevur Chelsea eitt undirskot upp á yvir eina hálva milliard krónur.




DÝRUR LEIKARI

*Darren Bent (vm.) hevur verið í nógvum feløgum, og hvørja ferð fyri stórar keypsupphæddir*

Undirskotið verður strikað hvørt ár av Roman Abramovich.

Í januar keypti Chelsea Fernando Torres frá Liverpool fyri 440 milliónir krónur. Teir keyptu eisini David Luiz fyri áleið 185 milliónir frá Benfica. Hesu bæði keypini eru bæði fíggjað av Roman Abramovich sjálvum.

### Liverpool keypir stórt inn

Liverpool hevur keypt tveir dýrar dreingir í januar. Fyrst kom Luis Suarez fyri 200 milliónir krónur frá Ajax. Síðani kom heldur óvæntaða keypið av Newcastle framherjanum, Andy Carroll, fyri ikki minni enn 305 milliónir krónur. Tað merkir, at Liverpool hevur keypt fyri 505 milliónir krónur, men hvør fíggjar keypini?

Fyrst seldi Liverpool Ryan Babel til Hoffenheim í Týsklandi fyri góðar 50 milliónir krónur. Síðani var nógv umtalaða sølan var Fernando Torres, sum tryggjaði Liverpool 440 milliónir krónur. Tað gevur saman lagt 490 milliónir krónur. Tað gevur eitt netto nýtslu upp á 15 milliónir krónur. Sostatt er tað bara pengarnir hjá Roman Abramovich, ið Liverpool hevur brúkt víðari.

### Aston Villa og Darren Bent

Nógv høvdu ilt við at skilja, at Aston Villa valdi at keypa Darren Bent frá Sunderland fyri 160 milliónir krónur. Prísurin kann fara heilt upp á 212 milliónir krónur, um Darren Bent og Aston Vila klára seg væl. Aston Villa eigarin er ríkmaðurin úr Amerika, Randy Lerner.

Í summar seldi Aston Villa James Milner til Manchester City. Virksemið hjá Manchester City verður fíggjað við pengum hjá Sheik Mansour, sum keypti felagið í 2008. Síðani søluna av James Milner hevur Aston Villa ikki keypt stórt inn. Sostatt eru tað pengarnir fyri James Milner, ið eru brúktir víðari upp á Darren Bent.

### Sunderland og sølan av Darren Bent

Steve Bruce keddur av at Darren Bent var seldur, men felagið legði 50 milliónir krónur á borðið fyri Stephane Sessegnon. Og aðrir leikarar komu eisini til felagið í millum annað leigu avtalum. Alt fyri pengarnir fyri Darren Bent.

### Manchester City og Sheik Mansour

Liðið hjá Gunnari Nielsen keypti Edin Dzeko frá Wolfsbourg fyri 240 milliónir krónur. Men aftur her eru tað ríkmenn, ið spýta pengar í. Sheik Mansour er ríkmaðurin handan Manchester City og eins og í Chelsea, so verður árliga undirskotið útjavnað við pengum frá eigarunum sjálvum.

### Niðurstøðan

Hóast tvær milliardir krónur ljóðar óhugnaliga nógv, so gevur tað talið ikki eina greiða mynd av tí, sum er farið fram. Tað er rætt, at Premier League feløgini í januar brúktu tvær milliardir krónur upp á leikarar, men teir flestu av pengunum eru brúktir fleiri ferðir. Einastu feløgini, ið ikki hava selt fyri at keypa stórt eru Chelsea og Manchester City. Tey hava bæði ríkmenn, ið spýta pengar í, so rokniskapurin melur runt. Hvar Roman Abramovich og Sheik Mansour fáa sínar pengar frá, tað er so ein heilt onnur søga!

*trondur@sosialurin.fo*

## Enska Barclays Premier League

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Manchester United | 25 | 15 | 9 | 1 | 55-24 | 54 |
| 2 | Arsenal | 25 | 15 | 5 | 5 | 54-27 | 50 |
| 3 | Manchester City | 26 | 14 | 7 | 5 | 42-22 | 49 |
| 4 | Chelsea | 25 | 13 | 5 | 7 | 46-22 | 44 |
| 5 | Tottenham | 25 | 12 | 8 | 5 | 35-27 | 44 |
| 6 | Liverpool | 26 | 11 | 5 | 10 | 34-31 | 38 |
| 7 | Sunderland | 26 | 9 | 10 | 7 | 32-31 | 37 |
| 8 | Bolton | 26 | 8 | 9 | 9 | 36-37 | 33 |
| 9 | Stoke | 25 | 10 | 3 | 12 | 31-32 | 33 |
| 10 | Newcastle | 25 | 8 | 7 | 10 | 40-38 | 31 |
| 11 | Blackburn | 26 | 9 | 4 | 13 | 34-42 | 31 |
| 12 | Fulham | 26 | 6 | 12 | 8 | 28-28 | 30 |
| 13 | Everton | 25 | 6 | 12 | 7 | 33-34 | 30 |
| 14 | Aston Villa | 26 | 7 | 8 | 11 | 30-45 | 29 |
| 15 | Blackpool | 25 | 8 | 4 | 13 | 38-49 | 28 |
| 16 | Birmingham | 24 | 5 | 12 | 7 | 24-33 | 27 |
| 17 | West Bromwich | 25 | 7 | 5 | 13 | 31-48 | 26 |
| 18 | Wigan | 26 | 5 | 11 | 10 | 26-44 | 26 |
| 19 | Wolverhampton | 25 | 7 | 3 | 15 | 26-43 | 24 |
| 20 | West Ham | 26 | 5 | 9 | 12 | 27-45 | 24 |

Stoke City – Sunderland 3-2
Aston Villa – Fulham 2-2
Everton – Blackpool 5-3
Man City – West Brom 3-0
Newcastle – Arsenal 4-4

Tottenham – Bolton 2-1
Wigan – Blackburn 4-3
Wolves – Man United 2-1
West Ham – Birmingham 0-1
Chelsea – Liverpool 0-1